# Høgni og óendaligur handatváttur

JOHN JOHANNESSEN
Form. í uttanlandsnevndini



**Enn einaferð roynir Høgni Hoydal at stigmatisera onnur og gera seg til talsmann fyri tí góða og reina. Hesaferð er tað tað partvís Javnaðarflokkurin, sum eftir hansara høvdi spælir dupultspæl í uttanríkispolitikkinum. Millum linjurnar í tíðindaskrivi í dag roynir hann at geva Javnaðarflokkinum ábyrgdina av ræðuleikunum í Irak. Linjan hjá Javnaðarflokkinum hevur verið greið og dupultspælið eigur Høgni Hoydal. Eg skilji ikki, at hann ikki yppir øksl at sær sjálvum**

Tað var á fundi í uttanlandsnevnd løgtingsins tann 3. oktober 2002, at Javnaðarflokkurin sum tann einasti flokkurin á løgtingi noktaði fyri, at USA í stríð við viljan hjá ST skuldi brúka føroyskt loftrúm í sambandi við náðileyst álop á Irak.

Fundurin í uttanlandsnevndini var tann fjórði í røðini fyri tingsetuna 2002. Júst hesin fundurin var komin í lag í sambandi við, at táverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevði heitt á uttanlandsnevndina, um at siga sína hugsan til umbøn frá amerikanska hervaldinum, um at fáa loyvi at brúka føroyskt loftrúm í hernaðarligu atgerðunum ímóti Irak. Fundurin vardi frá kl. 09.05 til klokkan 10.15. Longu tá fundurin byrjaði var greitt, at Javnaðarflokkurin var einasti flokkur, ið fór at mótmæla nýtslu av føroyskum loftrúmi til slíkt endamál.

Andrias Petersen, sum umboðaði Javnaðarflokkin, førdi soljóðandi í gerðabókina: "*Ein minniluti, Andrias Petersen, tekur ikki undir við, at loyvið hjá amerikanskum stríðsflogførum verður givið treytaleyst, men mælir til, at málið um álop á Irak fyrst skal roynast í ST høpi*".

**Høgni sat við endan**
Formaður í uttanlandsnevndini um hetta mundið var Hergeir Nielsen umboðandi Tjóðveldisflokkin. Formaður í Tjóðveldisflokkinum var Høgni Hoydal. Varaløgmaður um hetta mundið var Høgni Hoydal og landsstýrismaður fyri suverænitetI, lógarmálum og rættartrygdini hjá tí einstaka um hetta mundið var Høgni Hoydal.

Støðan hjá Hergeiri Nielsen og harvið Tjóðveldisflokkinum til álvarsmálið var ongin. Fólkafloks- løgmaðurin í samgongu við Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin mælti til at geva loyvi uttan treytir, og hesum setti Tjóðveldisflokkurin seg ikki ímóti. Hergeir Nielsen førdi í gerðabókina, at hann helt seg ikki kunna taka støðu til málið, meðan Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin tóku undir við, at USA slapp at nýta føroyskt loftrúm sum teir vildu til hernaðarligar atgerðir.

Hetta hendi í teimum døgum, tá Høgni Hoydal hevði ábyrgdina av suveræniteti og rættartrygd...

**John heldur fast við støðuna**
Støðan hjá Andriasi Petersen í 2002 var ein greið støða. Javnaðarflokkurin virðir endamálið við ST og vil ikki hjálpa ávísum londum at traðka onnur lond ella fólkasløg undir fótum. Júst hesa somu støðuna havi eg hildið fast við í mínum virki í uttanlandsnevndini síðani 2004.

Tí havi eg tvær ferðir formliga gjørt púra greitt, at Føroyar eiga at boða frá, at vit ikki góðtaka, at føroyskt loftrúm verður nýtt til ólógligan flutning av fangum. Somuleiðis havi eg mælt til, at løgmaður tekur stig til at fáa kannað, um ólógligur flutningur av fangum fer fram í føroyskum loftrúmi.

Eg havi ikki, eins og Tjóðveldisflokkurin gjørdi í 2006, 2007, 2008 og aftur nú, mælt til fullkomiliga at sýta fyri, at nakað amerikanskt hernaðarflogfar fær loyvi at flúgva yvir Føroyum. Tí hetta er at gera seg inn á ST-samtyktina um endurbygging av Irak og inn á ST-samtyktirnar um felags stríð ímóti yvirgangi. So mikið stór er mín virðing fyri ST, at eg heldur ongar ætlanir havi, um at fara at seta meg upp ímóti ST-samtyktum í framtíðini.

Í sambandi við umbønina um yvirflúgving í ár hava vit í Javnaðarflokkinum ikki mótmælt ólógligum fangaflutningi í føroyskum loftrúmi. Hetta kemst av, at áðrenn uttanlandsnevndin skuldi taka støðu, hevði Obama gjørt av at steingja Guantanamo leguna, og tí er grundarlagið undir fangaflutninginum burtur.

**Ypp nú øksl**
Nú havi eg í øllum førum gjørt eina smædna roynd at siga Høgna Hoydal frá um føroyska leiklutin í hesum máli. Vónandi er hann so mikið at sær komin, at skjalprógvini fáa hann at yppa øksl at sær sjálvum og síggja sín egna dupultmoral í hesum máli. Tað ber ikki til at liva í ævigum handatvátti.

# Kaj Leo rópar um stýrhúsrút

SJÚRÐUR SKAALE



**Skerjingarnar innan útbúgving vísa nógvum fólki av landinum. Men koma tey aftur at ferðast, fáa tey einar nýggjar Føroyar at síggja!**

Føroyar verða í ár riknar við umleið eini hálvari milliard í undirskoti.

Men við ABC-samgongun hevur skútan fingið góðar yvirmenn. Og við Kaj Leo Johannesen hevur hon fingið ein skipara, sum ikki letur seg taka av fótum fyri tað, um stormurin ýlur og brotini bróta.

Vit hava øll hoyrt hansara eggjandi, gløggu og víðskygdu røður, sum ganga Obamasa retorikki ein skarpan gang.

Vit skulu ikki falla í fátt! rópar Kaj Leo um stýrhúsrút. Vit skulu fokusera upp á møguleikarnar!

Og tað eru ikki bara tóm orð hjá Kaj Leo og hansara manning. Orðini eru vorðin lóg. Fíggjarlóg. Og tey siga, at vit skulu stoypa og bora! Vit skulu komandi árini gera tunlar og vegir fyri eina komma sjey milliard! Umframt skúladepil við Marknaðgil! Umframt ábøtur á landssjúkrahúsið!

Yes! Vit seta fulla ferð á motorin!

Vit gera vegir til landskassin er tómur. Og tá hann er tómur, mugu vit bara vóna, at vit kunnu læna til fleiri vegir.

**Burtur við fjasi**
Men sjálvandi – í slíkum vandatíðum er ikki rúm fyri øllum. Tað má skiljast millum tað, sum er neyðugt, og tað, sum er fjas.

Eldri fólk kunnu sjálvandi ikki sita og rópa um ókeypis heilivág. Burtur við tí.

Einkjur og einkjubørn kunnu ikki krevja stuðul. Burtur við teirra túsundkrónuseðli.

Hægri útbúgving og gransking kunnu ikki mennast. Og tað ger heldur einki. Fyri tað fyrsta er slíkt bara fyri akademikarar í Havn. Og fyri tað næsta kunnu hesi bara fara til Danmarkar at pilkast við sítt fjas.

Vit hava sjálvandi heldur ikki ráð til at menna Fólkaskúlan. Men børnini skulu nokk læra at lesa fyri tað.

Vit mugu eisini skerja Vinnuháskúlan. Men tey ungu fólk sum ikki sleppa inn har, líða heldur onga neyð. Eisini tey kunnu fara til Danmarkar at læra.

Øll hesi mugu hava í huga, at tað er fíggjarkreppa.

Og tey mugu skilja, at vit skulu hava vegir og tunlar fyri eina komma sjey milliard.

Tey, sum nú fara til Danmarkar at læra, eru sjálvsagt vælkomin aftur at ferðast.

Og tá fara tey at skilja, at Kaj Leo og hansara fólk høvdu rætt. Tí tá fáa tey einar nýggjar og stórslignar Føroyar at síggja. Einar Føroyar við nýggjum vegum fyri eina komma sjey milliard.

# »Familjurnar fara í upploysn!«

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN
Løgtingskvinna



**Ávaraðu tingmenn í ramasta álvara, nú uppskotið hjá Tjóðveldi um dupultan útbúgvingarstuðul til stakar uppihaldara var til 1. viðgerð á tingi í vikuni**

**Sjálvt uppskotið**
Uppskotið snýr seg um, at stakir uppihaldarar skulu fáa dupultan útbúvingarstuðul, meðan teir eru undir útbúgving. Vit vita, at fleiri teirra noyðast at velja útbúgving frá, tí tað er ov trupult at fáa endarnar at røkka saman, sum skipanin er í dag. Eiheldur hava vit lestraríbúðir, sum givið hevði bøtt um støðuna. Havi áður skrivað um uppskotið, og eg gleddist veruliga um viðgerðini, tí helmingurin av tingfólkunum hildu, at ábøtur vóru neyðugar, og vildu fremja munagóð átøk í verki..

**Konservatismuhvøkkurin**
Fái sum frammaná hvørja ferð eg hoyri tingmenn bera fram – í ramasta álvara enntá - at ansast má eftir, tí slík uppskot kunnu føra við sær at familjur fara í upploysn. Kennir tú nakað par, sum hevði farið hvør til sítt, tí at nú var gjørligt at fáa smáar 3800 kr mánaðarliga eyka undir útbúgving? Haldi, at slíkur hugburður ber boð um at lítið álit á foreldrum.

**Kriminell?**
So er tað hitt argumentið sum eisini altíð verður nýtt, tá vit tosa um stakar uppihaldarir: "Spurningurin er um uppskotið er so gott. Tí kanska fólk fara at snýta. Fáa sær dupultan útbúgvingarstuðul, hóast tey í veruleikanum ikki eru støk." Skelkandi ha? Hvussu ber tað til, at slíkar grundgevingar bert verða nýttar, tá talan er um stakar uppihaldarar? Vit hava SO nógvar ymiskar stuðulsskipanir – stuðulsskipanir sum onkur helst hevur gjørt sær dælt av. Tað løgna er bert, at eg **ongantíð** havi hoyrt hendan ivan sáddan um nakran annan málbólk. Hvussu ber tað til?

**Kynspolitiskt mál?**
Eisini helt onkur uppskotið vera kynspolitiskt. Well, um so var, at helvtin av teim 33 tingfólkunum vóru kvinnur, mundi javnstøðulógin so ikki verið samtykt nakað væl fyrr enn 1994? Mundu korini hjá støku uppihaldarunum (sum oftast er kvinnur) ikki verið nakað væl betri enn í dag? Mundi fíggjarlógin og harvið eisini raðfestingarnar sæð væl øðrvísi út enn í dag?

Men sjálvandi er bert gott, um tað er sjónligt at fleiri kvinnur eru á tingi. Men vit eru tíverri bert 5 av 33.

**Konstruktivt kjak**
Helt annars kjakið vera kveikjandi – flestu framsøgufólk og viðmerkjarar vóru positiv og samd um, at ábøtur vóru neyðugar. Landsstýriskvinnan í mentamálum ásannaði eisini, at hesin málbólkur skuldi raðfestast og hon vildi gera sítt til at fremja ábøtur. Hetta fegnast vit sjálvandi um í Tjóðveldi.

# Grundað vón um Sandoyartunnil?

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna



Eiga sandoyingar at hava eina grundaða vón um undirsjóvartunnil, spyr Páll á Reynatúgvu undirritaðu í bløðunum.

Svarið er ja. Sandoyingar – og øll onnur, sum taka undir við einum undirsjóvartunli til Sandoynna – hava fingið greið lyfti um tunnilin, og er teirra vón tí grundað.

Men, um tey kunnu vænta at nakað hendir undir ABC-samgonguni, er meira enn ivasamt – hóast fagurt lyfti í samgonguskjalinum um at byrja at bora tunnilin í hesum valskeiðinum. Enn hevur samgongan ikki boðað frá, hvør veruliga ætlanin er við tunlinum, men tey flestu okkara hava ta fatan, at hann er lagdur á ís.

Páll á Reynatúgvu var sjálvur við til at gera eina semju millum CHE-flokkarnar um ein leist fyri Sandoyartunnilin. Higartil einasta realistiska ætlan fyri hendan undirsjóvartunnil, sum hevur sæð dagsins ljós.

Tíverri tók hin táverandi sandoyartingmaðurin ikki undir við semjuni. Í staðin gjørdi hann eitt øgiligt rumbul, meldaði seg úr CHE-samgonguni og mundi gera sítt til at forkoma bæði samgongu og ætlanini fyri tunlinum. Síðani hevur eingin ítøkilig og realistisk ætlan verið um Sandoyartunnilin.

Rætta adressan fyri spurningin um, hvørt sandoyingar eiga at hava eina grundaða vón um undirsjóvartunnil er landsstýriskvinnan í samferðslumálum. Landsstýrið skyldar bæði sandoyingum og okkum øllum eitt greitt svar: Hvør er ætlanin við Sandoyartunlinum?